# Starvsfólk til starvsfólkadeildina á FT

*"at læra uttan at hugsa er burturspilt arbeiði – at hugsa uttan at læra er vandamikið"*

- Konfusius -



**Til starvsfólkadeild okkara søkja vit eftir einum fólki, sum saman við verandi manning skal menna fyritøkuna at taka ímóti teimum avbjóðingum á starvsfólkaøkinum, sum nútíðar og framtíðar marknaður og menning krevja.**

Á starvsfólkadeildini arbeiða í dag 3 fólk, sum taka sær av starvsfólkaviðurskiftunum í fyritøkuni - bæði fyristingarligum og menningarligum. Starvsfólkadeildin er virkin í tilgongdum og verkætlanum í fyritøkuni og arbeiðir harumframt við at menna framferðarhættir á ymiskum økjum.

Vit kunnu bjóða einum komandi starvsfelaga eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har avbjóðandi uppgávur og menningarhugur eru í hásæti. Tann, ið settur verður, fær møguleika at seta sítt sjálvstøðuga merki á arbeiðið umframt at fáa samstarv við dugnalig starvsfólk.

**Arbeiðið umfatar:**

- Ráðgeving og coaching av starvsfólki og leiðarum
- At skipa fyri menningartiltøkum á leiðslu- og starvsfólkaøkinum
- Gerð og umsiting av innanhýsis framferðarhættum
- Handfaring av setanum og lønarviðurskiftum

**Vit ímynda okkum, at tann, ið sett/ur verður,**

- Hevur viðkomandi miðal ella hægri útbúgving.
- Kann arbeiða sjálvstøðugt við ráðgevandi og undirvísingaruppgávum
- Hevur royndir við og kennir seg væl í samspæli við menniskju
- Hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir
- Hevur hugflog og áræði til at skipa fyri tiltøkum

Eisini má viðkomandi vera til reiðar til at útbúgva seg í mun til krøv og ynskir hjá Føroya Tele.

Setanarviðurskifti og løn vera ásett eftir avtalu.

Neyvari upplýsingar fáast við at venda sær til Ásvør Skaalum, starvsfólkaleiðara, tel. 303030.

Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 14. november 2007 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn
*ella*
starvsfolkadeildin@ft.fo

Føroya Tele er samtak við móðurfelag, FT Net, FT Samskifti og Televarpinum. Í samtakinum eru 260 starvsfólk við sera fjølbroyttum útbúgvingum og royndum.

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*

# Handverkarar og arbeiðsmenn



Løvu Betong er í fer við at byggja nýtt elementvirki á Norðskála, ið skal framleiða 1. floks betongelementir til tann nógv vaksandi byggimarknaðin í Føroyum.
Tørvur er á bæði handverkarum og arbeiðsmonnum. Um gjørligt, verður tann fyrsta tíðin í Reykjavík, har neyv upplæring verður.

**Starvsøkið**
Alt innan betongelementir:
- Stoypa
- Isolera
- Binda jarn
- Ísetan av vindeygum

**Førleikar**
Dugir tú títt handverk og ert ágrýtin, ert tú tann rætti til arbeiðið.

Arbeiðstíðin er full tíð og lønin verður sambært avtalu.

Meira fæst at vita um starviðið, við at venda sær til stjóran, Regin Johannessen á tlf. 58 68 01



**P/F Løvu Betong**

**Flatnavegur 8 · 460 Norðskáli · Tel +298 422316 · betong@betong.fo**

